SPÆLVIÐ

# STANDMYNDAVEIÐA

## 6 TÚRAR RUNT Í HAVNINI





# FORÐORÐ

## Vita tit, hvar standmyndirnar í Havn eru?
## Ella hvussu tær eita?

Standmyndaveiðan gevur tykkum høvi at forvitnast um okkara spennandi dýrgripir. Standmyndaveiðan vísir nakrar leiðir, har tykkara stovnur fer á rannsóknarferð við korti yvir leiðina, ið tit velja tykkum. Harafturat eru góð ráð til fyrireikingar, áðrenn tit fara, og góð ráð til uppfylgjandi aktivitetir, tá tit koma aftur á stovnin.

Barna- og ungdómsøkið hjá Tórshavnar kommunu hevði 2021 sum spæliár, og tá ið átakið *"Spæl við"* fór úr startblokkinum, settu stovnarnir í eind B sær m.a. fyri at fáa tilfar til vega til ymiskar standmyndatúrar í býnum. Teksturin og myndirnar hevur fyritøkan Beini gjørt í samstarvi við eind B.

Vónandi kann faldarin kveikja og stimbra námsfrøðiliga arbeiðið við børnum og ungum í Tórshavnar kommunu. Faldarin er gjørdur í tráð við Barna- og ungdómspolitikkin hjá TK og brotið úr Dagstovnalógini §2, sum m.a. sigur: *"Við umsorgan, í tryggum og barnavinarligum umhvørvi, at menna og menta børnini á fullgóðan hátt.."*.

Faldarin er eisini teldutøkur á heimasíðuni www.torshavn.fo.

SPÆLVIÐ

Standmyndaveiða
© Tórshavnar kommuna 2022

Hugskot: Beini
Uppseting: AnniJanni
Prent: Føroyaprent

# INNIHALDSYVIRLIT


**TÚRUR 1**
Hugflog, himmalspegil og rørsla **7**

**TÚRUR 2**
Spegling, endurskin og innari myndir **17**

**TÚRUR 3**
Hugflog **27**

**TÚRUR 4**
Standmyndir **35**

**TÚRUR 5**
Hugflog **47**

**TÚRUR 6**
Hugflog **57**

TÚRUR 1

# HUGFLOG, HIMMALSPEGIL OG RØRSLA

?

**HUGLEIÐIÐ** eitt sindur um, áðrenn tit fara avstað, hvat HUGFLOG, HIMMALSPEGIL og RØRSLA er fyri nakað.

Kunnu STAND-myndir siga okkurt um rørslu, ljóð og at føla nakað?

Tosið eisini um, hvat BLÁDÝPI, HIMMALHVÁLV og SPEGILSMYND er?

Hvat kunnu spegilsmyndir (reflektiónir) fáa okkum at hugsa um?

# TÚRUR 1


Sundsvegur
Undir
Undir
Svartafossi
Norðari Ringvegur
Sundsvegur
Norðari Ringvegur
Poul Juels gøta
Hvannkrókur
Gundadalur
Gundadalur
Hallarheygur
Gundadalur
Gundadalur
Gundadalur
Heinagøta
Gundadalsvegur
Brattabrekka
Oman Viðarlund
Oman
Viðarlund
Gundadalsvegur
Gundadalsvegur
Varðalág
Mammulág
Tinghús

# NORÐURLANDAHÚSIÐ



Norðurlandahúsið stóð liðugt í 1983 og er mentanarhús, sum hevur til endamáls at breiða føroyska og norðurlendska mentan út til føroyingar, norðurlendingar og útlendingar í Føroyum. Eisini virkar Norðurlandahúsið fyri at breiða føroyska mentan út í Norðurlond og onnur lond.

Norðurlandahúsið er ein byggilistarlig perla, og tankin við húsinum er, at tað skal ímynda ein álvaheyggj (elverhøj), sum vanlig fólk fáa loyvi at kaga inn í og varnast, hvussu lívið inni hjá álvagentunum lokkar og dregur okkum at teimum. Tær dansa, syngja, spæla upp á ljóðføri, siga søgur og annað spennandi og hugtakandi. Kanska onkur tykkara dansar føroyskan dans í Norðurlandahúsinum. Søgan um Ólav Riddararós er ein felags norðurlendsk søgn, og tit kunnu ímynda tykkum hana og hava Norðurlandahúsið í huga. Tað høvdu arkitektarnir Ola Steen og Kolbrún Ragnarsdóttir, tá ið tey teknaðu Norðurlandahúsið.

## UPPGÁVA

**A** Fyrireikið tykkum til standmyndatúrin við at siga børnunum søguna um Ólav Riddararós og/ella farið upp á gólv. Tosið um, hvat hendir í søguni, og at í ævintýrum hendir mangt, sum ikki ber til í veruleikanum.

**B** Tosið um, hvørji Norðurlondini eru, og hvussu norðurlendsku fløggini síggja út. Børnini kunnu tekna og lita fløggini. Minnist eisini til at gera eitt sindur burtur úr sámaflagginum og sámafólkinum.

# SEYÐUR



Nógv forvitnisligt er at síggja kring Norðurlandahúsið. Gangið ein túr runt um húsið.
Út móti vegnum standa nakrir seyðir. Tá ið mjørki er, sýnast teir rættiliga veruligir, og summir bilførar eru vorðnir kløkkir. Havnin er vetrarfriðað, so seyður hevur ikki loyvi at ganga leysur í býnum. Onkur hevur kanska sæð ein veðr í tjóðri ella seyð á onkrari trøð, men tað er nakað annað.

Standmyndin (ella standmyndirnar) *Seyður* hevur danskarin Bernhard Lipsøe gjørt í 1996. Seyðurin er úr boygdum stáli og einfalt avmyndaður – næstan karikeraður.

## UPPGÁVA **Gakk runt um seyðin og eygleið hann**

Hvussu er hann gjørdur?

Hvussu er hann at nerta við?

Hvussu nógvir eru?

Er talan um eina heila familju við mammu, pápa og børnum? Hvussu sært tú tað?

Hvussu eitur ein "seyðafamilja"?

Hví hevur ein ongantíð ella sjáldan meir enn ein veðr?

Hvør er munurin á veðurlambi og gimburlambi?



Hvat er ein brundur?

Hvat er eitt heimalamb?

Hava tit havt heimalamb, ella kenna tit onkran, sum hevur havt?

Hvat ger ein við heimalomb?

# SVIMJARIN



*Svimjarin* (2006) er standmynd, sum Hans Pauli Olsen hevur gjørt. Hon stendur uttan fyri Svimjihøllina.

## UPPGÁVA

**Hygg at standmyndini.** Hvat sært tú? Hvussu sær svimjarin út? Hvat ger hann? Hvussu veitst tú tað? Hvar er vatnið ella svimjihylurin, sum svimjarin er í? Hvussu er tað við støddarlutfalli? Hvør partur av svimjaranum er í vatni og oman fyri vatnið?

Hvat er vatnskorpa (sig: van:skorpa) fyri nakað? Er hon líka ring fyri tenninar sum breyðskorpa?

*Kava* er eitt merkiligt orð. Fólk kunnu kava, men tað kann veðrið eisini. Er tað tað sama? Hvør er munurin? Sólin kann eisini fara í kav. Hvat hendir tá?

## UPPGÁVA

Tá ið tit koma heim á stovnin, kunnu tit tekna eina *skeiva* standmynd. Eisini kunnu tit arbeiða við *støddarlutfalli*. Tey vaksnu kunnu greiða frá, hvat støddarlutfall er, og leggja tykkum lag á við ymsum dømum um støddarlutfall.

Onkrar søgur eru eisini um ymsar støddir, t.d. *Teir tríggir bukkarnir Brúsi*, ævintýrið um *Tummilisu* og um *Lisu í Leikalandi*, tá ið hon drekkur okkurt merkiligt úr eini flósku og broytir stødd, og jólakalendarin um *Konuna, ið varð lítil sum ein teskeið*, sum var sendur í KvF í 2019.

# HIMMALSPEGILIN



*Himmalspegilin* (2011) eitur stóra listaverkið, sum Guðrið Poulsen leirlistakvinna hevur gjørt. Tað mesta av listaverkinum er felt niður í túnið. Tað o.u. 8 m í tvørmáti og úr svørtum sementflísum við keramiskum formum, sum eru stoyptir í flísarnar. Keramisku formarnir hava ymiskt skap og ymiskar litir. Ljós eru eisini feld í summar flísar. Um dagin eru ljósini partur av prýðinum, og um kvøldið lýsir túnið sum ein himmalspegil við smáum veikum vetrarstjørnum.

## UPPGÁVA

**Hvat fær orðið *Himmalspegil* teg at hugsa um?** Gakk runt um listaverkið og hugsa um, hvussu listaverkið sær út, og hvussu navnið "Himmalspegil" hóskar. Sært tú stjørnurnar? Hvussu síggjast kringlutu og ymiskt littu skapini aftur á himmalhválvinum? Hvat man vera í rúmdini?



## UPPGÁVA

Gerið tykkara egna himmalspegil, t.d. við at tekna, mála, perla, arbeiða við leiri, gandadeiggi ella pappírsdeiggi.

# ÍTRÓTTUR




*Ítróttur* (2005) eftir Hans Paula Olsen. Gundadalur er høvuðsítróttaøkið í Havn, og standmyndin Ítróttur stendur á einum granittblokki við innkomuna til ovara vøll.

## UPPGÁVA

**Hygg eftir standmyndini.** Nert við hana? Hvussu kennist hon? Hvussu nógv fólk sært tú? Hvat annað sært tú? Riggar tað, at hon eitur "Ítróttur"? Kundi standmyndin itið okkurt annað? Øll uppskot eru vælkomin. Er rørsla í myndini? Hvussu tá? Hvat ger tann liggjandi persónurin? Líkist hann svimjaranum? Hví/hví ikki?

## UPPGÁVA

Tá ið tit koma heim á stovnin, skulu tit tekna ella gera eina standmynd, sum er øvug henni, tit hava sæð: Tann liggjandi persónurin skal sparka, og persónurin, sum eigur beinini, ið renna og sparka, skulu tit tekna liggjandi.

**Tey vaksnu hjálpa børnunum á glið:**
Beinini eru tað, sum eitur metonymi, t.v.s. ein umskriving, ið ofta er soleiðis, at ein partur umboðar heildina. T.d. spyrja tey vaksnu ofta, um tú hevur etið allan matpakkan, og tey halda tað vera gott, um tú hevur gjørt tað. Men tú hevur ikki etið pappírið. Eisini siga tey viðhvørt, at tú hevur etið tveir tallerkar við døgurða. Tað passar ikki. Tú hevur etið døgurða, men ikki tallerkarnar. Hatta er metonymi, og soleiðis snakka vit. Hava tit onnur dømi?

# BLÁDÝPIÐ



*Bládýpið* (1996) er ein totalinstallatión úr glasi, sum tú kanst fara inn í. Botnur og loft eru løgd við spegli, og síðurnar eru bæði útskornar og klæddar við glasi. Tú fært kensluna av at sveima mitt í sjónum ella mitt í verðini – millum himmal og hav. Optiskt kanst tú síggja 700 metrar upp og niður. Tróndur Patursson gjørdi listaverkið í sambandi við, at Keypmannahavn var kosin til mentanarbý í 1996 og hevði boðið ymsum listafólkum at gera listaverk úr bingjum í einari bingjupark í Norðhavnini.

Tróndur Patursson má sigast at vera fjøllistamaður og fæst við eitt nú málningalist, glaslist, jarnsmíð, høggmyndir og evnar verk úr kopari, rekaviði o.ø. Hann er eisini ævintýrari og hevur siglt um fleiri heimshøv í bátum og á flakum, sum eru bygdir soleiðis, sum hildið verður at upprunafólk hava ferðast um heimshøvini. Á einari av ferðum sínum, tá ið hann fór um Kyrrahavið á bambusflaka við millum øðrum írska vinmanni sínum, Tim Severin, sum hann hevði ferðast saman við fyrr, fekk hann hugskotið til *Bládýpið* ella *Kosmiska rúmið*. Sum hann sigldi og eygleiddi stjørnurnar um næturnar, fór hann hugsa um dýpið, teir sigldu á. Aldurnar vaggaðu og bóru flakan um hav, og hann kendi seg vera bæði í vekt- og tíðarloysi. Hesa frum- og náttúrukenslu vildi hann úttrykkja listarliga, og úrslitið gjørdist bingjan Bládýpið, ið av sonnum má sansast!

## UPPGÁVA

**A** Far inn í bingjuna og ver inni har saman við okkurt um 2-3 øðrum í umleið tveir minuttir uttan at siga nakað. Tú skalt lurta, nerta og vita eftir, hvat kemur tær til hugs. Tá ið tú kemur út aftur, skalt tú skriva og/ella tekna upplivingina, sum tú fekst í bingjuni. Far inn eina ferð aftrat og vita, um kenslan er hin sama ella øðrvísi og hugsa um/gruna yvir, hvat er øðrvísi ella tað sama. Greið eisini frá tí annaðhvørt við at skriva ella tekna tað.

**B** Sitið saman, t.d. øll ella smærri bólkar, og prátið um, hvat upplivingin í bingjuni gjørdi við tykkum. Hvat hugsaðu tit? Hvat føldu tit? Kendu tit tykkum lítil, stór, trygg, ótrygg, glað, smæðin, djørv o.s.fr.?

**C** Hvat var heilt ítøkiliga at síggja? Hvørji litir vóru? Sóu tit nakrar figurar ella myndir? Hvørjar?

**D** Alt livandi hevur sín uppruna í havinum ella vatni. Eisini vit menniskju hava okkara uppruna í vatni. Snakkið saman um, hvussu tað er at vera í móðurlívi og at síggja dagsins ljós. Hvat er ein ljósmóðir? Hvør kann frágreiðingin vera, at pinkubørn duga at svimja hundasvimjing og lata nøs og svølgrúm aftur, soleiðis at tey ikki seta vatn í hálsin, tá ið tey fara undir?

**E** Hóska Himmalspegilin og Bládýpið saman? Hvat hava tey í felag, og hvat líkist frá? Hvussu hóskar listaverkið Svimjarin saman við Bládýpinum? Kann nakað vera um tað, at vekt og støðd í vatni er øðrvísi enn úr vatni (t.d. uppi á landi ella í báti)?

## UPPGÁVA

Tá ið tit koma aftur á stovnin, kunnu tit gera nøkur listaverk, sum mann kann fara inn í eins og bingjan. Eisini kunnu tit gera nøkur, ið vísa, at vekt og tyngd ikki eru til (ella sett úr gildi). Hvussu kann ein gera tað?
*Tey vaksnu kunnu hjálpa við at fáa íblásturin á glið.*

TÚRUR 2

# SPEGLING, ENDURSKIN OG INNARI MYNDIR

**HUGLEIÐIÐ** eitt sindur um, áðrenn tit fara avstað, hvat SPEGLING og ENDURSKIN (reflektión) og INNARI MYNDIR eru fyri nakað.

Eisini kunnu tit tosa um eygað sum sansagagn, t.d. hvussu tað sær og fatar litir, litbrigdi, formar og skap. Eygað klárar í ávísan mun at laga seg til ljós og myrkur. Tað er eisini við eygunum, at vit duga at meta um ferð og fjarstøðu. Eygað samstarvar t.d. neyvt við heilan, og allar myndir, sum heilin og eygað taka inn í høvdið, venda á høvdinum og verða "vendar við" uppi í heilanum, so verðin vendir rætt, tá ið vit uppliva hana.

Børn, tá ið tey eru lítil, hava ikki so "spiltan" heila sum vaksin og duga ofta væl at lesa myndir og bøkur "á høvdinum". Summi varðveita henda førleika, onnur missa hann, og listafólk leita eftir hesum førleika og arbeiða við honum.

## UPPGÁVA

Royn og statt á hondunum og vita, hvussu alt sær út. Tú kanst eisini hanga út av einum stóli ella einari sofu ella bukka teg niður og hyggja millum beinini og ganga og vita, hvussu alt er, tá ið verðin er øvut. Hvussu er tað? Hvussu sær alt út, og hvussu flytur alt seg? Vita, um tú dugir at tekna "tá ið vit eta matpakka í eini øvutari verð".



Hvussu eitur alt, sum myndar eygað? Eygnasteinur, eygnalok, táraræsi o.s.fr.

## TÚRUR 2



Gundadalsvegur
Oman Viðarlund
Oman
Viðarlund
Mammulág
Gundadalsvegur
Gundadalsvegur
R.C. Efferøes gøta
Tinghúsvegur
Tinghúsvegur
Varðagøta
Kráarvegur
Dalagøta
Varðagøta
Mariugøta
Varðabú
Varðabú
Varðagøta
Jústsgøta
Hoydalsvegur
Húsagøta
Oman Pisuvarða
Undir
Pisuvarða
Pedda við Stein gøta
Sílagøta
Varðagøta
Villumsgøta
Niels Finsens gøta

# SPEGLING



Listaverkið *Spegling* (1990-92) úr bronsu eftir Hans Paula Olsen er 4 m høgt. Listaverkið er av barnakonu og spegilsmyndin av henni. Sjálvt um myndin eru úr bronsu, sæst, at upprunatilfarið er leirur, og at listamaðurin hevur arbeitt miðvíst við hondum og fingrum. Fingramerkini standa eftir og vísa, hvussu hann hevur lagt orku í verkið við at klína og evna til. Um spegilsmyndin er niðari partur av myndini, so vantar stætturin (sokkulin) í veruligi myndini. Hvussu ber tað til, og hvat man vera hent?

## UPPGÁVA

**Hygg eftir myndini og nert við hana.** Hvussu sær hon út? Hvussu er hon gjørd? Hevur listamaðurin størri ella minni hendur og fingrar enn tú? Hvussu veitst tú tað? Hvussu sær barnakonan út? Gomul, ung, glað, álvarsom o.s.fr.? Hvør standmynd er spegilsmynd av hvørjari – tann, sum vendir øvut, ella hin? Hví heldur tú tað? Stilla teg framman fyri standmyndina, bukka teg niður og hygg at standmyndini millum beinini á tær sjálvari/sjálvum. Sær niðara standmyndin øðrvísi út, tá ið hon ikki vendir á høvdinum?

## UPPGÁVA

Farið tvey og tvey saman og gerið ymsar standmyndastøður (t.d. einar 5 í part), sum makkarin skal spegla.

# SKUGGIN





Standmyndin *Skuggin* (1987) er gott 2 m høg og úr bronsu. Listamaðurin Hans Pauli Olsen hevur gjørt hana. Eitt fólk situr niðast móti einum tvídimensjónellum flata, ið kundi mint um eitt fjall ella berg. Ovast á flatanum stendur eitt annað lítið fólk. Fólkini eru trídimensjónell.

## UPPGÁVA

**Hygg eftir standmyndini, nert við hana og hugsa um, hvussu stórt, lítið, ruflut ella slætt alt er.** Hvat man fólkið ovast gera? Hvat skal tað ímynda, sum fólkið stendur á? Og hvat við fólkinum í neðra? Hvussu sær tað út? Er nakað serligt við tí? Er henda standmyndin eisini gjørd úr leiri upprunaliga? Hví/hví ikki?

Um tú verður biðin um at finna mótsetningar í listaverkinum, hvat sært tú so?

Hví man verkið eita Skuggin? Hvat merkir tað at sita í skugganum, at vera í skugganum á onkrum, at vera ein skuggi av sær sjálvum? Hvat er ein skuggi fyri nakað? Hvat skal til, fyri at tú kanst fáa/finna/síggja ein skugga? Sólin kann eisini fara í kav. Hvat hendir tá?



# FALLIÐ



Bronsustandmyndin *Fallið* (1987-88) er 6 m høg, og eisini hesa hevur Hans Pauli Olsen gjørt.

Ovast á tindinum stendur ein maður, ið ger seg til reiðar at leypa útav. Beinini eru krept og annar armurin strektur, men við hinum heldur maðurin fyri eyguni. Undir fjallinum tykist tað, sum at hann hevur lopið útav. Trýstmyndin av einum persóni við ørmunum strektum út frá sær bendir á, at lopið er farið fram.



## UPPGÁVA

**Hygg at standmyndini.** Gakk rundan um hana. Nert við hana. Blunda og lat fingrarnar fara eftir standmyndini og vita, hvussu hon følist. Fær hon teg at hugsa um okkurt ávíst?

Stilla teg sum maðurin í erva. Lat teg falla fram og vita, hvussu leingi ella langt tú kanst lata teg falla, áðrenn nú noyðist at stíga fram við øðrum beininum fyri ikki at detta.

Hygg eftir trýstmyndini undir fjallinum. Tað er ein trýstmynd av listamanninum sjálvum. Hvussu sært tú tað? Hvat fær trýstmyndin teg at hugsa um? Hví man standmyndin eita Fallið? Onkur sigur, at listafólk siga, at tey mugu ofra seg fyri listini. Hvat man tað merkja? Heldur tú, at tað kann passa? Kennir tú orðingina, at “mann ofrar seg í fótbólti”? Hvat merkir tað?

Hví man maðurin í erva leypa? Hví heldur hann fyri eyguni? Skilur tú, at hann ger tað? Hví/hví ikki?

## UPPGÁVA

Máta upp, hvussu langt 6 m eru, og merk tað av. Fá tær renningarferð og vita, hvussu langt tú klárar at leypa. Hvør er munurin á at leypa eftir jørð og leypa sum lítli maðurin ovast á listaverkinum?

# YVIR OG UNDIR VATNI



Standmyndin *Yvir og undir vatni* (1986) er 3 m høg og úr bronsu. Hans Pauli Olsen listamaður hevur gjørt, og eins og hinar er fyrimyndin gjørd úr leiri, áðrenn bronsustandmyndin er stoypt.

Standmyndin lýsir ein strektan kvinnukropp á einum stætti. Tann parturin av kvinnukroppinum er í vanligari stødd, men ovari partur er nógv minni og vendir hin veg. Við heitinum ”Yvir og undir vatni” minnir listamaðurin hyggjaran á proportiónir og spælir sær við støddarlutfall. Hann vísir tað við vatnskorpuni, sum spælir sjónini eitt “puss”. Veruleikin verður broyttur, og tað, sum vit síggja, er ikki veruliga veruleikin – ella er tað tað? Hvat er upp og niður? Og hvat er aftur og fram?

## UPPGÁVA

**Hygg eftir standmyndini.** Nert við hana. Hvat serligt varnast tú? Hvat sigur tær, at talan er um eina konu? Vita, um tú klárar at standa eins og hon. Samanber hesa standmyndina við hinar tríggjar. Á hvønn hátt líkist hon teimum? Á hvønn hátt er hon øðrvísi? Man tann fyrsta standmyndin, sum eitur Spegling, vera spegilsmynd í vatni ella veruligum spegli? Hvussu mangar standmyndir eru kvinnur, og hvussu mangar menn? Hvussu veitst tú tað? Kann onkur standmynd vera kanska bæði kvinna og/ella maður?

## UPPGÁVA

Kennir tú nakra aðra standmynd eftir Hans Paula Olsen, sum lýsir tað at vera undir og yvir vatni? Hvar er hon? Er hon akkurát líka, ella er okkurt øðrvísi við henni?






# MINNISVARÐI TEIRRA SJÓLÁTNU

*Minnisvarði teirra sjólátnu* er reistur til minnis um teir, sum fórust á sjónum undir seinna heimsbardaga, 1939-1945. Hann varð vígdur 22. juli 1956, og tað var Ruth Poulsen, seinni gift Jensen, ið avdúkaði hann. Hon er dóttir Hans Poulsen, sum fórst við trolaranum Nýggjaberg úr Miðvági í mars 1942. Standmyndin vísir ein sjómann, ið stendur á einum akkeri og lítur út á sjógv. Á minnisvarðanum eru plátur við nøvnunum á teimum, ið fórust av krígsávum.

Føroyingar sigldu til Íslands og keyptu fisk og førdu hann til Bretlands, tí har var mattrot og stórur eftirspurningur eftir fiski. Inntøkan var góð, men teir sigldu vandasjógv, tí teir kundu bæði sigla á minur og verða skotnir niður. Í mun til fólkatalið mundi einki land missa so nógv fólk á sjónum sum Føroyar hesi árini. Menn í bestu árum, og mong syrgdu og saknaðu pápa, mann, son, vinmann og skipsfelaga.

Tað er vanligt at hava minnisvarðar, og fleiri bygdir í Føroyum hava minnisvarða um sínar sjólátnu. Ofta eru teir avmyndaðir við kvinnu og børnum, t.v.s. pápin ella maðurin manglar. Hann kom ikki afturíaftur. Vit hava eisini kirkjugarðar við gravum, har vit minnast okkara kæru og kunnu leggja blómur. Tey, sum hava mist onkran á sjónum, hava ofta onga grøv at vitja. Tí kann vera gott at hava ein minnisvarða, har ein kann leggja blómur ella krans. 1. novembur, ið er allahalgannadagur, er eisini minningardagur teirra sjólátnu, og tá er vanligt at leggja blómur og krans og hava minningargudstænastu fyri sjófólki okkara.



## UPPGÁVA

**Hygg eftir standmyndini.** Hvussu sær sjómaðurin út? Hvat ger hann? Sært tú akkerið, sum hann stendur á? Hví man hann standa á einum akkeri? Hvat verður tað brúkt til? Hvat merkir tað, sum stendur á plátuni frammanfyri? (fá onkran vaksnan at týða tað saman við tær). Hvussu nógvar navnaplátur eru? Hvussu mong nøvn eru á plátunum? Meira enn 50, 100, 150 ella 200? Hvussu langt síðan er tað, at seinni heimsbardagi var? Hvussu leingi vardi hann?

Veitst tú av, at bretar hersettu Føroyar, og at teir komu á Havnina 12. apríl í 1940 við tveimum oyðarum (destroyarum) og boðaðu frá, at Føroyar vóru hersettar. Seinni komu fleiri bretskir soldátar til Føroyar (serliga skotskir soldátar frá herdeildunum The Lovat Scouts og The Cameronians). Onkuntíð mundu teir vera einir 8.000 í tali, og bara í Vágum vóru okkurt um 5.000. Tað var einar 8-10 ferðir meira enn vanliga fólkatalið, og tað merktist.

Teir gjørdu vegir og koyrdu í vinstru síðu, eins og mann framvegis ger í Bretlandi. Tað bar heldur ikki til bara at ferðast vestur í Vágar, tí ein skuldi hava pass, - eins og tá ið tú fert uttanlands nú á døgum. Orsøkin til at so nógvir soldátar vóru í Vágum, var tí at teir bygdu flogvøll har. Tað er sami flogvøllur, sum enn verður nýttur, men hann er nógv størri nú enn tá.

Bretar vildu vera fyrstir at herseta Føroyar, tí teir vóru í kríggi móti Týsklandi, og Danmark, sum Føroyar hoyrdu til, var hertikið av Týsklandi. Føroyar vóru eitt danskt amt, og tað merkti millum annað, at vit flaggaðu við donskum flaggi. Hetta bar ikki til, søgdu bretar, tí um vit síggja tykkara skip við donskum flaggi, halda vit tað vera fíggindan, og so verða tey skotin niður. “Hava tit ikki tykkara egna flagg?” spurdu teir. “Jú, men tað er ikki alment viðurkent (t.v.s. føroyingar høvdu ikki loyvi at flagga við tí)” – “Tað ber væl til at fáa í lag,” søgdu bretar. Og longu 25. apríl 1940, bara 13 dagar aftaná, at oyðararnir vóru her, settu bretar kunngerð í gildi, sum segði, at Merkið (føroyska flaggið) var almenna flaggið í Føroyum. Og tað hevur tað verið síðan. Tí halda vit flaggdag 25. apríl. 25. apríl er faktiskt føðingardagurin hjá Merkinum, sjálvt um tað varð gjørt longu í 1919.

## UPPGÁVA

**Tekna og set litir á Merkið.** Veitst tú, hvussu danska flaggið eitur, og hvussu tað sær út? Kanna tað norska og íslendska flaggið og samanber við tað føroyska. Veitst tú, hví tey munnu líkjast? Øll londini hava tað í felag, at tey einaferð hava hoyrt til Danmark. Nú hoyra bara Føroyar og Grønland til Danmark. Hvussu sær tað grønlendska flaggið út? Tekna tað og set litir á. Hvussu eitur tað? Tað hevur ongan kross, men eina sól. Hví tað? Fá onkran vaksnan at finna út av tí saman við tær.

## UPPGÁVA

Finn útav, hvussu tað enska og skotska flaggið síggja út. Tekna tað og set litir á. Hvussu eitur bretska flaggið, og hvussu sær tað út? Hvat hevur tað í felag við tað enska og skotska.

## SAMANUMTØKA, tá ið tit hava verið í viðarlundini og á minnisvarðanum

Tá ið tit koma heim á stovnin kunnu tit arbeiða við Hans Paula Olsen sum fyrimynd. Um tit arbeiða við leiri, gandadeiggi ella pappírsdeiggi kunnu tit gera smáar standmyndir ella figurar við íblástri frá tí, tit hava sæð í viðarlundini. Tit kunnu seta fingramerki á verk tykkara, og tit kunnu spæla við støddarlutfall, spegilsmyndir og alt, alt, alt møguligt millum himmal og jørð.

Prátið um minnisvarðar, og hví vit í Føroyum munnu hava so nógvar minnisvarðar um sjólátin. Tit kunnu eisini práta um, at viðurskiftini eru broytt, og at tað tíbetur ikki doyggja so nógv á sjónum nú sum fyrr.

Kortini er gott at duga at svimja og ikki ræðast vatn. Hví tað? Hugleiðið eitt sindur um vatn – hvat tað kann brúkast til, hvussu neyðugt tað er, og hvar vatn er. Til dømis munnu øll hús í Føroyum hava rennandi vatn. Vatn er eisini í nógvum mati, uttan at vit geva okkum far um tað. Veitst tú av, at 96,4 % av eini agurk er vatn? Hvør er munurin á vatni og sjógvi?

## TÚRUR 3

# HUGFLOG

**HUGLEIÐIÐ** eitt sindur um, áðrenn tit fara avstað, hvat HUGFLOG er fyri nakað. Kann ein síggja tankar og hugsanir hjá fólki? Eru tankar til, hóast teir eru ósjónligir? Tyggið orðið hug-flog. Kann hugurin flúgva? Hvagar fer hann? Um hann fer, nær kemur hann so aftur? Og hvat er hent á túrinum, har hugurin hevur verið á flogi?

# TÚRUR 3



Tinghúsvegur
Effersøes gøta
Tinghúsvegur
R.C. Effersøes gøta
Jústsgøta
Húsagøta
Húsagøta
Hoydalsvegur
Mariugøta
Varðagøta
Oman Pisuvarða
Húsagøta
R.C. Effersøes gøta
Undir Pisuvarða
Villumsgøta
Niels Finsens gøta
Varðagøta
Jansstovugøta
Tungugøta
Lucas Debesar gøta
Tinghúsvegur
Sjúrðargøta
Sjúrðargøta
Sjúrðargøta
Tvørgøta
Brekkugøta
Lauritsargøta
Ovara Tvørgøta
Brekkugøta
Heygsbreyt
Lítla Tvørgøta
Tróndargøta
Kongagøta
Tórsgøta
Niels Finsens gøta
Kongagøta
Gripsvegur
Liðagøta
Steinatún
Dalavegur
Niels Winthers gøta
Sverrisgøta

# TARIRA



Bronsustandmyndin *Tarira* (2000) eftir Hans Paula Olsen. Til minnis um skaldið, listamannin og heiðursborgaran í Havn, William Heinesen (1900-1990), eisini róptur Stjørnuskaldið

## UPPGÁVA

**Hygg eftir standmyndini.** Gakk rundan um hana. Nert við hana. Stilla teg við síðuna av henni. Far burturfrá og gakk rundan um hana. Hvat sært tú? Hvussu var at nerta hana? Varnaðist tú okkurt serligt? Er hon lítil ella høg?

Standmyndin eitur *Tarira* eftir gentuni, sum stendur so glað og livandi á bronsuklettinum. Hon er hugflogið hjá Williami Heinesen. Tað síggja vit, tí hon kemur úr høvdinum á honum (hygg eftir vangamyndini og fá skil uppá, hvar nøs, eygu og skalli eru). William Heinesen er ein hin kendasti rithøvundurin í Føroyum. Hann skrivaði bøkur og yrkingar – á donskum, tí tá ið hann gekk í skúla, lærdi mann bara at skriva danskt, og heima snakkaði hann danskt við mammu sína.

William Heinesen var dugnaligur listamaður. Hann skrivaði eisini tónleik, dugdi væl at tekna og mála, og tá ið hann bleiv gamal og gavst at skriva, fór hann at gera klippmyndir. Myndevnini vóru alt møguligt, men serliga hugtikin vóru fólk av myndum við trøllum, huldufólkum, livandi steinum og verum, sum William millum annað hevði hoyrt um sum barn. Hann læt hugflogið sleppa út at reika og leita, og tá ið hann fann okkurt, vísti tað seg sum tónleikur, tekningar, málningar, orð, søgur og yrkingar.

Hann teknaði musuna Tariru og segði hana vera mynd um list og skaldskap sín. Aftanfyri á standmyndini er eisini ein figurur. Hvør er tað? Hvat ger hann? Hatta er ein spælimaður. Hann spælir violin. Hatta kann vera mynd um William sjálvan, men mest er tað ein tilvísing til eina ta kendastu bókina hjá Williami Heinesen, sum eitur *Glataðu spælimenninir* (1950). William Heinesen búði beint við viðarlundina, húsini standa enn. Tá ið hann var gamal, plagdu hann og konan, Lisa, at ganga túr í viðarlundini og sita á beinkinum við hylin og eygleiða dunnurnar.



**Tá ið tit ganga oman fram við ánni, kunnu tit eisini eygleiða dunnurnar, fuglarnar, vøksturin og ánna og vita, hvat náttúran hevur at siga tykkum í dag. Latið hugflogið sleppa at ferðast.**

# ORMABANI



Standmyndina *Ormabani* (1992) úr stáli og glasi, ið upprunaliga var eitt gosvatn, sum ljós var varpað á úr ánni, hevur Tróndur Patursson gjørt.

Íblásturin er helst komin úr Sjúrðarkvæðunum, har hetjan Sjúrður Sigmundarson á hesti sínum Grana ríður út á Glitrarheiði at basa orminum, sum liggur á mæta dýrgripinum. Tað eydnast bara, tí Sjúrður hevur tað rætta svørðið og tann rætta hestin.

Tá ið hann skuldi velja sær hest, gav mamman honum tey ráðini, at hann skuldi fara til fossin, kasta ein stein útí og velja sær tann hestin, ið ikki bleiv bangin.

Sjúrður fylgdi ráðunum og valdi sær Grana. Síðan fór hann við gamla svørðinum hjá pápa sínum til Regin smið at gera tað aftur, tí tað var farið í tvíningar.

Sjúrður mátti fáa eitt serliga væl gjørt svørð frá tí svikaliga, men dugnaliga Regini smiði. Regin royndi at lumpa Sjúrð og smíðaði honum fyrst eitt vánaligt svørð, men Sjúrður var ikki býttur. Hann royndi svørðið, áðrenn hann fór, og tað fór í "tógva lutir", sum tað eitur á kvæðamáli og merkir, at tað brotnaði í tvey petti. Hann fór aftur til Regin smið og bað um hin besta brandin, sum svørð eitur á kvæðamáli. Tað svørðið var gott, og tá hevði hann eisini lovað at geva Regini smiði hjartað á orminum, um hann vann á honum og fekk fatur á gullinum.

## UPPGÁVA

**Hygg at standmyndini.** Hvat halda tit um, at hon stendur mitt í ánni? Átti gosvatnið at riggað, ella bilar tað einki? Kenna tit nakað annað listarverk, sum Tróndur Patursson hevur gjørt?

Hann er eisini dugnaligur listamaður. Hann málar, teknar, ger standmyndir og listaverk. Ofta eru listaverkini stór, og hann er kendur fyri sín bláa lit, sum eitur ultramarin. Dansiringurin í rundkoyringini í Eysturoyartunlinum, bingjan í Listaskálanum (Bládýpi), trappan í SMS og portrið til kirkjuna í Kirkjubø eru listaverk eftir Trónd Patursson. Er nakar, sum hevur sæð ella varnast hesi listaverkini? Hvørjum tilfari eru tey úr? Minna tey um Ormabana? Hví/hví ikki?

Síggja tit, at Havnará "hvørvur"? Hon er sum hugflogið, ósjónlig eina løtu, men vísir seg aftur niðri á Kongabrúnni. Halda tit áin skuldi verið opin allan vegin oman á Kongabrúnna? Hví?

# HANS ANDRIAS DJURHUUS



Bronsustandmyndin *Hans Andrias Djurhuus* (1991) eftir Jens Peter Kellermann er til minnis um Hans Andr. Djurhuus sum skald og lærara. Hon stendur her bæði framman fyri heim hansara og Sjónleikarahúsið, tí hesi støðini høvdu so stóran týdning fyri hann. Og hann hevði stóran týdning fyri Sjónleikarhúsið.

## UPPGÁVA

**Hygg eftir standmyndini og nert við hana.** Hvussu nógv ár man maðurin vera? Hvussu sær hann út, - fittur, blíður, álvarsamur, óður, keddur, ivasamur...? Ganga menn í dag líka ílatnir sum hann? Hvat er øðrvísi?

Tit kunnu syngja ein sang fyri H. A. Djurhuus, sum hann hevur yrkt, ella kanska onkur lesur eina søgu. Í Ritsavni stendur alt møguligt.

Hans Andrias Djurhuus, sum var lærari, er serliga kendur fyri sínar barnarímur. Tit duga heilt sikkurt fleiri. Eisini kunnu tit læra tykkum onkrar og fara at lurta eftir upptøkum, tá ið onnur syngja tær. Hans Andrias yrkti viðhvørt, meðan hann var til arbeiðis. "Hugflogið fór avstað við honum," søgdu børnini í skúlanum og vistu, at tey ikki skuldu órógva hann.

Onkuntíð sluppu tey at yrkja við og hjálpa honum, og tá ið hann var liðugur at yrkja, sluppu tey at syngja sangir hansara. Viðhvørt segði hann søgur. Tað elskaðu børnini, tí hann dugdi so væl at siga frá. Hann hevur eisini funnið upp á nógvar søgur – tað er upp í fleiri bøkur. Hann skrivaði og yrkti alt møguligt, - eisini til vaksin, m.a. sjónleikir, sjómansrímur og fosturlandssangir. Hann verður ofta sagdur at vera Føroya fólkakærasta skald.

Hann var lærari í tí húsinum á Vaglinum, sum borgarstjórin hevur skrivstovu. Tað var læraraskúli, tá ið Hans Andrias arbeiddi har. Hann var eisini lærari í realskúlanum, sum er beint við gamla kommunuskúlan, sum nú eitur Finsen. Tað er stóri guli bygningurin hinumegin vegin, sum bleiv bygdur, tí gamli kommunuskúlin var ov lítil. Hygg á skjøldurin. Har er eitt risa listaverk.



**Hygg eftir merkinum á hurðini á Sjónleikarhúsinum og vita, um tú dugir at lesa tað.** Hví man skorturin lýsa mótsetning? Veitst tú, hvat mótsetningur er? Vita, um tú kemur í tankar um nakrar mótsetningar. Prátið um tað eina løtu.

## SØGUMAÐURIN



Standmyndin *Søgumaðurin* (1957) eftir Janus Kamban var partur av listprýðingini av Kommunuskúlanum, sum var vígdur í 1956. Janus Kamban (1913-2009) var fyrsti útbúni myndahøggari í Føroyum, og hann hevur gjørt nógvar standmyndir kring alt landið.

!

### UPPGÁVA

**Hygg at standmyndini og lat hugflogið reika okkurt um 1-1½ minutt.** Prátið um, hvat hon fekk tykkum at hugsa um. Hvat sært tú á standmyndini? Hvussu síggja fólkini út? Hví man ein sovorðin standmynd hanga á skjøldrinum á einum skúla? Hvat halda tit um tað? Ganga hasi børnini í skúla? Ganga tey í barnagarði ella frítíðarskúla?

## EYKAVINNINGUR – VITJAN Í AULUNI

Spyr, um tit kunnu sleppa inn í auluna at síggja listprýðingina. Tit kunnu taka afturíaftur William Heinesen, sum túrurin byrjaði við, og tit kunnu taka afturíaftur listaverkið *Ormabana*, tí søguevnið er hitt sama.

!

### UPPGÁVA

**Hygg at øllum listaverkunum eina løtu.** Gakk runt og hygg væl eftir teimum øllum. Hvat fáa listaverkini teg at hugsa um? Fáa tey hugflogið í gongd? Sært tú okkurt, sum er óhugnaligt, gott, fitt, løgið...?



Listprýðingin hevur Sjúrðarkvæðini sum íblástrarkeldu. Vit síggja, tá ið Sjúrður á Grana fer út á Glitrarheiði at vinna á orminum, ið liggur á gullinum. Myndevnið er ógvusligt, og tað er bardagin eisini. Tá ið Sjúrður hevur vunnið á orminum, hevur hann ormshjartað við til Regin smið, sum bíðar eftir honum nærhendis.

Sjúrður sker hjartað úr orminum og setur tað á ein tein (grillspjót) at steikja, men hitin frá bálinum fær fitina at renna eftir teininum, soleiðis at Sjúrður brennir seg um fingrarnar og stingur teir í munnin. Tá við eitt skilur hann fuglamál, og fuglarnir ávara hann um, at Regin smiður er svíkjari, at hann má drepa hann og sjálvur eta steikina. Hann aktar og kemur heim aftur við Grana og tólv kistum av gulli.

Summi siga, at veruligi dýrgripurin var ikki gullið, men at Sjúrður fekk førleika at skilja fuglamál – at hann dugdi at lurta, skilja og fekk vitan.

## UPPGÁVA

**Gakk eina ferð runt aftrat og hugsa um søguna og listaverkini.** Hugsa eisini um hinar standmyndirnar, sum tú hevur sæð, nortið við og hoyrt um í dag. Hvat hevur tú upplivað? Hvat hava tær sagt tær ella gjørt við hugflogið? William Heinesen vildi prýða Kommunuskúlan, tí Sjúrðarkvæðini vóru ein góð søga, men eisini tí, at føroyska málið er varðveitt, tí fólk fyrr í tíðini dugdu so væl at kvøða, siga søgur, lurta og minnast.

## SAMANUMTØKA, tá ið tit eru komin heim aftur, kunnu tit:

- Syngja ella lurta eftir onkrum sangum eftir Hans Andrias Djurhuus
- Lurta eftir onkrum klassiskum stykki eftir William Heinesen
- Yrkja ein sang
- Tekna ella mála túrin og hava eina listasýning fyri foreldrum
- Siga eina ferðafrásøgn
- Gera ein lítlan leik
- Mála á glas eins og Tróndur Patursson
- Tekna ella siga frá, hvussu tað er, tá ið hugflogið reikar
- Vísa, hvussu tykkara Tarira sær út





## TÚRUR 4

# STANDMYNDIR

**HUGLEIÐIÐ** eitt sindur um, áðrenn tit fara avstað, hvat standmyndir eru fyri nakað. Hvat vil ein siga við eini standmynd? Standmyndirnar í dag eru fyri tað mesta av fólki, men ikki Kongaminnið. Hvat er tað fyri fólk, sum standmyndirnar lýsa? Hví munnu so fáar barnastandmyndir vera?





Útsýnið av Kongaminni

# TÚRUR 4


Húsagøta
Undir
Vísuvarða
Egholmstrøð
Essala
C. Effersøes gøta
Jansstovugøta
Mýrigøta
Gripsvegur
Tunguøta
Lucas Debesar gøta
Tinghúsvegur
Sornhúsgøta
Fjósagøta
Hoyvíksvegur
Niels Finsens gøta
Tórsgøta
Kongagøta
Gripsvegur
A.C. Evensens gøta
A.C. Evensens gøta
R.C. Effersøes gøta
Bøkjarabrekka
Lítzenstrøð
Liðagøta
Steinatún
Winthers gøta
Undir Glaðsheyggi
C. Pløyens gøta
Nólsoyar Páls gøta
Tinghúsvegur
Hoyvíksvegur
Sverrisgøta
Niels Finsens gøta
Jónas Broncks gøta
Heinasonar gøta
Magnus
Tórsgøta
Vaglið
Vaglið
Amtmansbrekkan
Tróndargøta
Bøgøta
Mylnugøta
Húsabrúgv
Áarvegur
Laðabrekka
Krókabrekka
Vørðslan
M.A. Winthers gøta
Kirkjuvegur
Bryggjubakki
Grims Kambans gøta
Grims Kambans gøta
Bringsnagøta
Koparggøta
Erlings Jals gøta
Undir Ryggi
J.H. Schrøters gøta
Abbatrøð
Kongabrúgvin
Havnargøta
Bøgøta
Vágsbotnur
Bakkahella
Undir Bryggjubakka
Reyngøta
Áarvegur
Rektaragøta
Gongin
Bursatangi
Undir Kjallara
Eystara Bryggja
Skálatrøð

# KONGAMINNIÐ










Kongaminnið er obeliskur, ið var reistur til minnis um fyrstu kongsvitjanina í nýggjari tíð. Tað var Kristian 9. kongur, sum 25. juli kom higar í 1874, men Kongaminnið stóð ikki liðugt fyrr enn í 1882. Jákup Andrias Arge (Jampan) laðaði og evnaði Kongaminnið til eftir tekningum frá H.C. Arnbert. Jampan er kendur grótsmiður og hevur laðað nógvar bygningar og bygningsverk.



Vit hava orð, sum *Kongavarðar* og *Kongabrúgvin*, ið eisini hava okkurt í felag við Kongaminnið. Kongavarðar vórðu laðaðir ovarlaga á Kirkjubøreyni júst fyri at heiðra kong og heilsa honum, tá ið hann við skipi kom siglandi inn á Havnina. Tankin var at laða varðarnar stórar og høgar, so kongur skuldi síggja teir, men tíverri var mjørki, so hann sá teir ikki tann dagin.

Kongabrúgvin hevur fingið navnið av kongsvitjanini hjá Kristiani 9., tí í sambandi við dagin var nýggj atløgubryggja gjørd. Plássið niðri móti Eystaru Vág var flaggskrýtt og nógv fólk komið saman, tí kongur skuldi koma. Henda hátíðarløta var serlig, tí hon endaði ikki so væl. Borgarstjórin (formaðurin fyri sóknarstýrinum, sum tað æt) í Havn tá, sum skuldi taka ímóti kongi, náddi ikki at halda røðu sína fyri kongi lidna, so small hann deyður niður. Kongur var skelkaður av hesum, og hann hjálpti einkjuni fíggjarliga, so leingi hon livdi.

## UPPGÁVA

**Hygg eftir standmyndini og plássinum rundanum.** Hvat stendur á standmyndini, og hvat merkir tað? Tá ið tit koma heim á stovnin kunnu tit øll øva tykkum at gera tykkara egna monogramm við føðingardegi tykkara undir. Í staðin fyri kongakrúnu omanfyri, kunnu tit velja okkurt annað symbol, t.d. ein veðr (løgmansmerkið), eitt skip, eina stjørnu, eitt kelidjór o.s.fr.

## UPPGÁVA

**A** Hvussu nógvar smáar súlur eru kring Kongaminnið? Kann tað merkja nakað?

**B** Gáa um útsýnið í allar ættir. Hvat sært tú? Hvussu nógvar kirkjur sært tú? Hvussu mong skip sært tú? Sært tú, hvar tú býrt?

**C** Finn útav, hvat ein obeliskur er, og hvat hann ímyndar. Finn saman við teimum vaksnu útav, hvar onkrir kendir obeliskar eru og samanber teir við Kongaminnið.

**Visti tú,** at tá ið Kongaminnið var bygt, so var tað langt uttan fyri býin, og alt var bøur rundanum? Kanst tú ímynda tær, at Havnin var so lítil? Vegurin við Kongaminnið eitur Hoyvíksvegur, tí tann vegin gingu fólk niðan til Hoyvíkar fyrr í tíðini.

## Á Glaðsheyggi

# MAÐUR VIÐ TORVLEYPI OG NEYTAKONA

Nú eru tit komin um gamla hagaportrið og kunnu heilsa upp á tvey gomul fólk: *maður við torvleypi og neytakonu.*



Standmyndirnar úr gróti hava Eyvind Dalsgaard og danin Jens Peter Kellermann gjørt, og tær vóru avdúkaðar í 1984. Tær standa sum ein varði um eina farna tíð, tá ið menninir høvdu til arbeiðis at fara eftir torvi og konurnar at fara til neyta. Fólkini hava gjørt síni ørindi og eru á veg heim aftur. Spyr børnini, hvussu tey síggja tað.

Tað vóru fólk sum hesi, ið bygdu Havnina. Heftið tykkum við orðingina, tí tit koma at brúka hana seinni, tá ið tit fara fram við Føroya rætti.

## UPPGÁVA

**Hyggið eftir fólkunum og gerið eina søgu um tey.** Hvussu gomul eru tey? Hvussu eita tey, hvat hava tey gjørt? Munnu tey vera móð ella ikki? Hvat er í íløtunum, sum tey bera á bakinum? Hvat eita "íløtini"? Hvørjum klæðum ganga tey í, og hvar munnu tey vera keypt? Hvar fara fólkini, og hvar hava tey verið?

Farið tvey og tvey saman og gerið eina søgu, sum tit kunnu siga, skriva ella tekna.

Tit ganga eftir eini sniðgøtu millum hús

– og koma oman á vegin, ið eitur Undir Glaðsheyggi. Far til høgru og oman eftir Nólsoyar Páls gøtu. Hetta var ein av fyrstu vegunum í Havn, og tá bleiv hann róptur Ormurin Langi. Á vinstru hond koma tit fram við einum húsi, har tað stendur “Við lóg skal land byggjast” oman fyri hurðina. **Hvat er tað fyri hús, og hvat merkir tað, sum stendur skrivað?**




Tá ið tit koma longur oman er eitt høgt hús á vinstru hond og ein sera langur bygningur beint framman fyri tykkum á Tinghúsvegnum. Tosið um, hvat tað er fyri eitt hús, hvør arbeiðir har, hvat fólkini gera, og hvat tað er fyri eitt listaverk á húsasíðuni.



Húsasíðuna á skrivstovu- og umsitingarbygninginum hjá Føroya løgtingið hevur Hansina Iversen listakvinna gjørt. Hon arbeiðir ofta við listaverkum, sum er óheft av rúmi og dimensjónum.

## UPPGÁVA

**Kannið og vitið eftir, hvat tit síggja, og hvat listaverkið fær tykkum at hugsa um.** Hvat dámar tykkum heildina, tað í erva og tað í neðra? Hvat dámar tykkum litir og strikur? Neyðugt var at hava glas uttaná? Hví man tað vera?

So ganga tit niðan eftir Tinghúsvegnum og oman millum Ebenezer og gamla Sparikassan. Samanberið bygningar og hugleiðið um, at teir umboða hvør sína tíð. Tosið eisini um, at húsini úti á Reyni og tey eitt nú uppi á Løgmannabreyt ella undir Kongavarða líkjast frá og eru øðrvísi enn eldri føroysk hús.

# DANSANDI BØRN



Mitt á krossvegnum í gongugøtuni er standmyndin og gosvatnið *Dansandi børn* (1992) eftir Fridtjof Joensen. Listaverkið er úr stáli og stendur á grótstøði, ið er runt og kundi mint um ein sigmundarkross.

## UPPGÁVA

**Hvat gera børnini á standmyndini?** Hvussu síggja tey út? Er tað bæði gentur og dreingir? Hvussu sært tú tað? Riggar gosvatnið? Hvønn mun man tað gera, at børnini standa undir fossandi vatni ella ikki? Hvørjar aðrar barnastandmyndir kennir tú? Hvørjar standmyndir eru tær vanligastu? Hví man tað vera?

## UPPGÁVA

**Hvussu sær ein sigmundarkrossur út?** Vita, um tú dugir at tekna ein? Hvør er Fridtjof Joensen, og hvørji listaverk er hann kendur fyri? Hvussu plaga børnini at síggja út, sum hann avmyndar?

# MAÐUR OG KONA



Standmynd úr bronsu eftir Janus Kamban. Myndin er frá 1972 og eitur *Maður og kona*.

## UPPGÁVA

**Hvat vísir standmyndin?** Hóskar heitið? Hvussu síggja fólkini út? Eru tey vinir ella fíggindar? Hvussu sært tú tað? Hvat hevði hent, um konan flutti seg tvey fet til høgru? Hví? Ber til at lesa standmyndina sum mynd um føroyska samfelagið fyrr/nú? Hví/hví ikki?

## UPPGÁVA - til tey vaksnu og børnini

**Metonymi:** tosið eitt sindur um, hvat metonymi og pars pro toto er, og havið eina heimspekiliga samrøðu við børnini við máli og orðum í miðdepli. (Tit kunnu gera kort við myndum, orðum og/ella orðatøkum og tosa út frá tí).

**Javnvág:** tosið um, hvat javnvág og at javnviga merkja. Gerið ymsar javnvágir einsæris og tvey-og-tvey.

# RASMUS EFFERSØE




Bringumynd av *Rasmusi Effersøe* úr bronsu eftir donsku listakvinnuna Anne Marie Carl-Nielsen. Bringumyndin, sum er frá 1933, stendur á súlu úr føroyskum gróti, sum Óli Arge (Óla smið) gjørdi.

Rasmus Christoffer Effersøe (1857-1916) er kendur sum rithøvundur, skald og politikari. Hann yrkti m.a. fosturlandssangir og skrivaði sjónleikir á føroyskum, tá ið føroyskt skriftmál júst var komið í eygað.

Í Sjónleikarhúsinum oman fyri pallin hongur mynd av Rasmusi Effersøe. Hann hevur yrkt sangir sum "Úr øllum ættum koma vindar", "Eg minnist úr gomlum søgum" og "Føroyingar, sum her nú koma saman".

Hann var við til at stovna Sjálvstýrisflokkin í 1906 og var eisini við á kenda jólafundinum í 1888 í Tinghúsinum beint aftanfyri.

Standmyndin er reist honum til heiðurs fyri mentanarligu og politisku avrik hansara.

## UPPGÁVA

**Hvør var Rasmus Effersøe?** Nevn okkurt av tí, hann gjørdi og er kendur fyri? Hvat heldur tú um, at hann stendur mitt á Tinghúsvøllinum? Hvat heldur tú um, at bringumyndin stendur á eini súlu úr føroyskum gróti.

Hesa standmyndina hevur ein kvinna gjørt? Hvussu nógvar standmyndir veitst tú um, sum konur hava gjørt? Hví man tað vera?

Veitst tú, at ein gøta í Havn er kallað upp eftir Rasmus Effersøe og eitur R.C. Effersøes gøta? Finn útav, hvar hon er og gakk eftir henni. Sig, hvat tú sært? Er onkur kendur bygningur og onkur týdningarmikil bygningur har? Hvørjir?

## UPPGÁVA

**A** Lærið tykkum sangin "Heimið" (nr. 63 í Føroya fólks Sangbók). Snakkið um, hvat hann snýr seg um, og teknið okkurt av tí, sum hann inniheldur. Hvat er ein fosturlandssangur? Hvat merkir tað "at heimið er tað besta stað' á jørð"? Kann ein hava fleiri "heim"? Um ein hevur fleiri heim, kann ein so leingjast heim, hóast ein er heima? Kann ein hava fleiri móðurmál? Hvussu tá?

**B** Í sanginum "Á, tann deiliga Havn" hjá Elini og Kára, siga tey okkurt um Effersøe. Lurta eftir sanginum og vita, hvat tey syngja. Hvat annað syngja tey um?
Elin & Kári - Á, tann deiliga Havn - YouTube

# TRAÐARMAÐURIN




Standmynd úr bronsu, sum Hans Pauli Olsen hevur gjørt í 1989.

Standmyndin er til minnis um traðarmenninar í Havn. Sagt verður, at teir, sum løgdu traðirnar inn løgdu lunnar undir býin. HesiR somu traðarmenn vóru ofta eisini raskir útróðrarmenn, og tað var tað, sum teir lívbjargaðu sær. Við eini trøð kundu teir hava kúgv, velta epli og kanska hava seyð eisini. Uttan traðarmenninar og útróðrarmenninar var Havnin ikki tað, sum hon er í dag.

## UPPGÁVA

**Tosið eitt sindur um, hvat ein trøð er, og at vit hava staðarnøvn, sum eita Lützenstrøð, Frúutrøð, Skálatrøð o.fl.** Enn eru traðir til, men tær eru í Havnardali og heim eftir móti Gráa steini. Fyrr vóru traðirnar nærri býnum. Spyrjið børnini, hvussu tað ber til? Hvat man vera hent?

Hvussu sær traðarmaðurin út? Hví hevur hann ein stein í kneppinum? Man hann vera sterkur ella veikur? Hvat á standmyndini sigur tær tað? Hvat heldur tú um hendur og føtur hansara? Hvussu nógv ár man hann vera? Hví eitur einki "traðarkona"?

Samanber *Traðarmannin* við tey bæði á Glaðsheyggi, mannin við torvleypi og neytakonuna. Líkjast tey? Hvussu tá?

## UPPGÁVA

Tosið um, hvat konurnar mundu gera, og teknið eina "traðarkonu".

# SITANDI MAÐUR



Standmyndin *Sitandi maður* (2013) eftir Steinunn Þórarinsdóttur var partur av eini standmyndasýning, sum fevndi um allan býin. Standmyndir, sum líktust *Sitandi manninum* vóru ymsastaðni í býnum eitt ávíst tíðarskeið, og tá ið sýningin var av, keypti Tórshavnar kommuna *Sitandi mannin*.

## UPPGÁVA

**Hvussu sær standmyndin út?**
Er hatta ein maður ella ein kona ella okkurt mitt ímillum? Hví sigur tú tað? Hvat heldur tú um, at standmyndin situr á beinkinum? Er tað gott/ringt? Hví? Hvat tykist standmyndin hugsa? Hví sigur tú tað?

**Ein stutt og kend yrking eftir J.J. í Gerði ljóðar soleiðis:**

"Siti á einum beinki - og teinki - einki."

**Ein onnur yrking eftir Tórodd Poulsen ljóðar nakað soleiðis:**

"Á einum beinki situr ein maður,
gud viti, hvat hann man teinkja,
tí í morgun varð hann málaður."

**Hvat heldur tú um yrkingarnar? Hvussu hóska tær til standmyndina? Hví – greið frá.**

## SAMANUMTØKA,
## tá ið tit eru komin heim aftur, kunnu tit:

- Syngja onkran sang eftir Rasmus Effersøe
- Gera eina yrking ella ein sang til onkra av standmyndunum, sum tit hava sæð í dag
- Gera ein lítlan leik við íblástri frá onkrari av standmyndunum, sum tit hava sæð í dag
- Gera  onkrar av uppgávunum, sum eru umrøddar í sambandi við standmyndirnar

## TÚRUR 5


Traðabrekka
Traðavegur
Stoffalág
Tórgarðsgøta
Húsagøta
R.C. Effersøes gøta
Egholmstrøð
Essalág
Jansstovugøta
Mýrigøta
Tórgarðsgøta
Geil gøta
Djóna í
Tunugøta
Tinghúsvegur
Gripsvegur
Fjósagøta
Sornhúsgøta
Hoyvíksvegur
A.C. Evensens gøta
Tilfiugøta
Kongagøta
Gripsvegur
Bøkjarabrekka
Lützenstrøð
Sólteigur
Djóna í Geil gøta
Eysturstíg
Liðagøta
Steinatún
Undir Glaðsheyggi
C. Pløyens gøta
Lavagøta
Lítlatrøð
Sverrisgøta
Nólsoyar Páls gøta
Jónas Broncks gøta
Frúutrøð
Jóan Karls gøta
Djóna í Geil gøta
Niels Finsens gøta
Magnus Heinasonar gøta
Tórsgøta
Vaglið
Amtmansbrekkan
Bókbindaragøta
Tróndargøta
Bøgøta
Mylnugøta
Vaglið
Vørðslan
Frúutrøð
Húsabrúgv
Áarvegur
Laðabrekka
Krókabrekka
M.A. Winthers gøta
Kirkjuvegur
Erlings Jals gøta
Kopargøta
Grims Kambans gøta
Bryggjubakki
Bringsnagøta
Undir Ryggi
C.H. Schrøters gøta
Abbatrøð
Vaktarhúsbrekka
Djóna í Geil
Vágsbotnur
Bøgøta
Undir Bryggjubakka
Bakkahella
Reyngøta
Áarvegur
Kongabrúgvin
Havnargøta
Jónas Broncks gøta
Jekaragøta
Rektaragøta
Gongin
Bursatangi
Eystara Bryggja
Yviri við Strond
Undir Kjallara
Eystara Bryggja
Bryggja Eystara
Eystara Bryggja
Eystara Bryggja
Vestara Bryggja

TÚRUR 5

# HUGFLOG

?

**HUGLEIÐIÐ** eitt sindur um, áðrenn tit fara avstað, hvat HUGFLOG er fyri nakað. Í dag kunnu tit eisini tosa eitt sindur um, hvat ein standmynd er. Skal hon altíð "standa"? Hvat ímyndar hon? Hvat vilja fólk/myndugleikar siga við eini standmynd? Orð sum "heiðra onkran/onkra/okkurt" ella "til minnis um onkran/onkra/okkurt" kunnu tit eisini umrøða. Tit kunnu somuleiðis varnast, hvørjum tilfari standmyndir eru úr, og hví tað man vera.

**Tá ið tit koma heim aftur,** kunnu tit eitt nú tekna, mála, siga søgu og yrkja um tað, sum tit upplivdu og fóru at hugsa um á túrinum. Tit kunnu eisini tosa um kendar standmyndir úr øðrum londum, t.d. frælsisgudinnuna í New York, Lord Nelson á Trafalgar Square í London og Luxor obeliskin á Place Concorde í París (hann er nakað størri enn Kongaminnið). Hava vit í Føroyum slíkar standmyndir, ið minna um tær í stórbýum úti í heimi?

# Á SKÁLATRØÐ






**Hvat síggja tit á Skálatrøð?** Hví eitur tað Skálatrøð? Hevur tað nakað við trø og træ at gera? Kunnu tit ímynda tykkum, at har sum bilarnir standa parkeraðir, og har sum skipini verða drigin upp, var alt bøur fyrr í tíðini? Seyður, gæs og neyt hava gingið har, og fólk hava hoyggjað. Framman fyri eitt hús, sum eitur Smiðjan í Lítluvík stendur ein veðrur, og vegurin niðaneftir eitur Bøgøta, tí har var bøur einaferð í tíðini.

# VEÐRUR



Rógvi Hansen hevur gjørt *veðrin* úr bronsu í 2005.

## UPPGÁVA

**Hygg at veðrinum.** Hvussu sær hann út? Hvussu síggja ull, føtur, kleyvar, horn og nøs út. Líkist hann einum veruligum veðri? Hví/hví ikki? Tosið um úttrykkið "veðranøs" og at "stangast". Hvussu gamal man veðrurin vera? Greið frá, at seyðakøn fólk hyggja eftir øllum tí, tit eru biðin at hyggja eftir og øðrum við.

Hugleiðið um, hví veðrurin man standa her, og hví Havnin er vetrarfriðað. Hvat merkir tað "at vera vetrarfriðað"? Tosið eitt sindur um seyð, veðrar, ær, lomb, veðurlomb, gimburlomb, gimbrarlamb, ærlamb o.s.fr. Summastaðni í Føroyum er reiðilig kapping um at hava teir bestu veðrarnar.

Ber til at brúka ullina og hornini? Hava tit arbeitt við slíkum á stovninum, ella fara tit? Hvat gjørdu tey fyrr í tíðini, og hvat gera tey nú?

# TRAPPAN, VAGLIÐ OG ÁARVEGURIN

**Farið og kannið trappuna eitt sindur.** Hvussu mong tripputrin eru? Hvør vøkstur er har? Hvat serligt er við elsteyrunum? Gangið fram við laðaða grótgarðinum Bojsengarði og varnist alt, sum tit síggja kring tykkum úr gróti. Hvat síggja tit, og hvat halda tit um tað?





Bygningar úr gróti, føroyskum basalti, er býráðshúsið, sum upprunaliga var kommunuskúli, gamli sparikassa-bygningurin er longur uppi í býnum móti Glade Hjørn. Ein triði grótbygningur er Ríkisumboðið og ein fjórði Amtmansgarðurin fram við Áarvegnum. Prátið um, á hvønn hátt Ríkisumboðið víkur frá í útsjónd, og hvat tykkum dámar tað. Tosið um, hví vegurin man eita Áarvegurin. Greiðið eisini børnunum frá, at mitt á Vaglinum, har sum bilarnir møtast og kunnu fara fýra ymsar vegir vóru tveir hyljar ella dammar fyrr í tíðini. Stóri Dammur, tann ovari, og Lítli Dammur, tann niðari. Úr Stóra Dammi fingu havnarfólk vatn, og í Lítla Dammi vaskaðu tey klæði.

# ÁARSTOVA

Út móti Áarvegnum stóðu eini hús, ið itu Áarstova. Hús fyrr í tíðini høvdu mangan bara eitt rúm – ella eitt rúm, ið var størri enn øll hini, og tað var har, sum øll, ið búðu í húsunum, svóvu, ótu, gjørdu mat, bundu og arbeiddu við alt møguligt. Tað rúmið varð rópt roykstova ella bara stova, og av tí at fleiri hús bara høvdu tað rúmið, fór stova eisini at merkja hús.



Fleiri av húsunum á Reyni og aðrastaðni í Føroyum eita okkurt við stova. Áarstova æt soleiðis, tí hon var beint við ánna, og tveir kendir yrkjarar eru føddir og uppvaksnir har. Hon er tikin niður, tí ikki var pláss fyri henni, tá ið vegur skuldi gerast, men í staðin er ein minnisvarði settur upp á staðnum til minnis um brøðurnar báðar úr Áarstovu. Eisini er grannahúsini, matstovan Áarstova kallað upp eftir niðurtiknu húsunum, so vit ikki gloyma Áarstovu og áarstovubrøðurnar.

# ÁARSTOVUBRØÐURNIR




**Práta um, hvussu standmyndin sær út.** Hvat hoyrir til standmyndina og ikki? Sig teimum søguna um Hans Andrias Djurhuus og Janus Djurhuus – ávikavist tann fólkakæri og tann eliteri yrkjarin. Annar var lærari og hin sakførari.

Hans Andrias yrkti barnarímur og sangir, sum hvørt mansbarn dugdi fyri 50 árum síðan. Viðhvørt yrkti hann saman við børnunum í skúlanum. Lærið tykkum einar 3-4 sangir, sum tit kunnu syngja á staðnum. T.d. “Lítla Elsa fekk frá mammu síni”, “Lítli beiggi, tú mást ikki gráta”, “Másin sigur pli, pli, pli”, “Kongaríkið í Bábylon”, “Kom nú lítli mín, set teg her” o.fl.

Janus Djurhuus yrkti øðrvísi, men var eisini óførur. Hann týddi nøkur av klassisku griksku hetjukvæðunum til føroyskt, yrkti um grikskar gudar og kempur, hevði klassiskan skaldskap til fyrimyndar og dugdi væl bæði at fáa tað at vera serstakt og hábærsligt. Nakað, sum fólk mettu høgt. Hann var Føroya fyrsti modernaði yrkjari. Fólk høvdu ikki upplivað sovorðið á føroyskum fyrr, so Janus má sigast vera úrmælingur. Ein kend yrking eftir hann er “Í búri” (Kúrir tú lítli songfuglur mín), og ein onnur er “Mítt land hevur fostrað eitt ravnaslag”.

Í staðin fyri at fara oman á Kongabrúnna og út eftir kaiini kunnu tit fara niðan Laðabrekkuna, hyggja inn í garðin hjá Ríkisumboðnum og steðga eina løtu við minnisvarðan um Niels R. Finsen.

# NIELS RYBERG FINSEN

## – minnisvarði yvir av Quillinsgarði í Laðabrekkuni



Niels Finsen (1860-1904) var sonur amtmannin Hannes Finsen og Johannu Formann og vaks upp í Føroyum, áðrenn hann fór til Danmarkar at lesa medisin. Hann er kendur fyri at varnast strálur og granska, hvussu tær kundu lekja og bøta heilsuna. Hann fekk nobelvirðisløn fyri sína gransking og er einasti føroyingur, ið hevur fingið tann heiður. Orsøkin til, at minnisvarðin er her, er, at her spældi Finsen sum smádrongur. Hann búði á amtmansborgini (Ríkisumboðnum), sum er beint við. Hann hevur enntá rist forbókstavir sínar, NRF, í helluna. Vitið, um tit duga at finna stavirnar. Ein søga er um, at hann longu sum smádrongur varnaðist, at okkurt gott og gevandi mátti vera í sólarljósi og sólstrálum. Hann legði til merkis, at kettuni dámdi so væl at liggja á trappusteininum, tá ið sólin skein. Og tá ið hon kom at liggja í skugga, flutti hon seg, soleiðis at hon aftur kundi liggja og dunsla í sólini.

## UPPGÁVA

**Tá ið tit koma heim á stovnin, kunnu tit kanska fáa knív og eitt træpetti, sum tit kunnu rista tykkara forbókstavir í.** Tit kunnu eisini tekna tykkara forbókstavir, klippa teir út og líma teir á eitt træpetti ella pappstykki, sum tit litprýða. Gerið eina myndaframsýning við øllum forbókstøvunum og leggið til merkis, hvussu stavirnir síggja út, og hvussu nógvar ella fáar stavir summi tykkara hava. Hvat er tað mest vanliga – at hava tveir, tríggjar ella fleiri stavir?







Vit ganga undir Ryggi, gjøgnum Kilarkanalina aftan fyri Trygingina og niðan eftir Skansavegi.

Steðga á og lít heim á Kongabrúnna, yvir á Reyn og runt økið innan fyri Molan. Hygg yvir á Skansan og tosa um, hvat er á Skansanum (kanónir, viti o.a.), og hvat hann hevur verið brúktur til (á døgum Magnus Heinasonar, tá ið Brillumaðurin var her og Nólsoyar Páll stríddist móti honum, og undir 2. heimsbardaga, tá ið bretar hersettu Føroyar)-





# FRÍA FRÍÐA



Bronsustandmyndiin *Fría Fríða* (2004) eftir Hans Paula Olsen.

Tað serliga við henni er, at hon er í tveimum pørtum, so møguliga er talan um tvær standmyndir. Hon eitur *Fría Fríða*, og tað er neyvan av tilvild.





## UPPGÁVA

**Gakk runt um standmyndirnar og granskið tær eitt sindur.** Eru tær heilt eins, ella eru onkur frávik? Hvørjum tilfari eru tær úr? Hvørjum tilfari er grótið úr, sum tær sita á? Hvussu síggja tær út? Keddar, glaðar, innhugsnar, líkasælar, álvarsamar ella…? Vita, um tit kunnu sita eins og tær? Hvussu man ein hava tað, og hvat man ein hugsa, tá ið ein situr sum tær?

Standmyndin eitur Fría Fríða. Hvat merkir tað? Hvør standmynd er tann "fría" og hvør tann "fríða"? Tey vaksnu kunnu hjálpa tykkum at tosa um, hvussu lík bæði orðini eru, og hvat tey merkja. Tey ljóða púra eins, men -ð hevur heilt aðra merking við sær. Hvat man hugskotið vera við at nevna standmyndina *Fría Fríða*?

## SPÆL OG RØRSLA – *Gerið tykkum til standmyndir*

Lat børnini gera kætislop (gadedrengeløb) á vøllinum kring standmyndirnar í 20 sek. og sig "STOPP". Tá ið "STOPP" verður sagt, skulu tey frysta til standmyndir.

Tit kunnu gera hetta eina løtu og broyta innihaldið eitt sindur. T.d. kunnu kætislopini gerast frameftir, aftureftir, síðulangs, høgt, frameftir o.s.fr. Standmyndirnar kunnu eisini verða gjørdar eftir ávísum krøvum, t.d. allar skulu standa á einum beini, á fjórunum, ella onnur hondin skal nerta við høgra knæ.

# ÚTI VIÐ STROND

Tit kunnu tosa um, at einaferð var hetta langt uttan fyri býin, har sum fólk í Havn búði. Fólk búðu at kalla bara úti á Reyni. Skansin var eisini langt vekk, og soldatarnir, sum vóru knýttir at Skansanum búðu á Reyni og høvdu traðir úti við Strond, niðan frá húsunum á Reyni, t.d. har sum Jónas Broncks gøta er, Havnar Bio/Pizza 67, Býarbókasavnið, bussarnir í Steinatúni steðga, Grasagarður, parkeringsplássið á Skálatrøð og aðrastaðni, tit júst hava gingið. Tit kunnu syngja fyrsta ørindi av "Í góðum veðri hann dyrgdi" eftir H.A. Djurhuus, annan av áarstovubrøðrunum, og vísa børnunum á Hotel Havgrím, og at Eystfalsskker er nærhendis.



## UPPGÁVA

**Børnini kunnu fáa til uppgávu at fara heim at spyrja foreldur, ommur og abbar og kanska eisini langommur og langabbar (um tey hava tey á lívi), hvørji spøl tey spældu sum børn, og hvat leikutoy tey høvdu.**

Tá ið tey hava verið heima og spurt, kunnu tey práta um tað í rundingi. Tit kunnu spyrja tey, hvat tey hava varnast, sum er øðrvísi, t.d. um tey spæla tað sama ella onnur spøl, og hví tað man vera. Mundi tað vera stuttligari fyrr? Heldur tú, at foreldrini høvdu viljað havt tað leikutoyið, sum børnini nú á døgum hava? Hví/hví ikki?

Uppgávan kann eisini vera so, at tey í fyrsta umfari tosa við foreldur, øðrum umfari ommur og abbar o.s.fr. (tað kann vera ein hjálp hjá teimum at læra seg at tosa við eldra ættarliðið, at tey byrja við foreldrunum).

Tit kunnu royna tykkum sum yrkjarar og hava ein sang hjá Hans Andriasi Djurhuus sum fyrimynd.

Brúkið t.d. lagið "Lítla Elsa" og gerið innihaldið nútíðarligt. Hvat fáa børn frá mammu og pápa sínum nú á døgum? Munnu børn sita á sóljuteigi og spæla, ella eru tey onkra aðrastaðni? Finnið bara upp á fleiri hugskot.

## TÚRUR 6

# HUGFLOG

?

**HUGLEIÐIÐ** eitt sindur um, áðrenn tit fara avstað, hvat HUGFLOG er fyri nakað. Í dag kunnu tit eisini tosa eitt sindur um, um ein kann føla, anda og hoyra ein túr. Tit kunnu tosa um sansirnar, og hvat hendir, um ein roynir at lata ein aftur, t.d. eyguni ella oyruni? Hvussu "sær" verðin so út? Hvat hendir við ljóðunum, um vit blunda? Hvussu man vera at ganga í ferðsluni og einki hoyra? Í dag skulu tit túr og umframt at brúka eyguni og síggja ymiskt, skulu tit lurta, nerta og snodda.

Tá ið tit koma heim aftur, kunnu tit eitt nú tekna, mála og yrkja um tað, sum tit upplivdu og fóru at hugsa um á túrinum.

! ***Havið tummastokk við (til eina uppgávu úti við Vesturkirkjuna)***

# TÚRUR 6


Nolsøes gøta
Grønlandsvegur
Landavegur
V.U. Hammershaimbs gøta
Sigmundargøta
Skálatrøð
J.C. Svabos gøta
Handan Á
Skipargøta
Vestara Bryggja
Nóatún
Hornagøta
Norðurrás
Rundingur
Símunargøta
Miðrás
Rasmusargøta
Dahls gøta
Jákups
Háskúlavegur
Suðurrás
Álaker
Á Frælsinum
Eystan Heyg
Eirargarður
Sandagerðisvegur
Undir Heygnum
Heygsmannavegur
Velbastaðvegur
Gásadalsvegur
Biggjarvegur
Doktara Dahls gøta

# Á VEG OMAN Í VÁGSBOTN OG ÚT EFTIR SKÁLATRØÐ

**Hvat síggja tit? Hvat hoyra tit?** Hoyra tit, hvar tit eru, og hvar tit ganga? Hvat fortelur tykkum, hvar tit eru? Hvør man eiga allar bilarnar á Skálatrøð? Hvat gera fólkini, sum eiga bilarnar? Síggja og hoyra tit nakað annað livandi enn fólk? Fuglar, hundar, kettur v.m. – hvat gera tey? Hvat er ein flótibrúgv?

Fáið tey vaksnu at siga frá um støð og fyribrigdi, hvussu tey eita, og hvat tey verða brúkt til.

## Lykilorð

**Húsalitir og –útsjónd**
**Tinganes · Vágsbotn · flótibrúgv**
**bilar · bátar · Skálatrøð ·**
**Skeiva Pakkhús · Müllers Pakkhús ·**
**Westward Ho · Skipasmiðjan**

# VEÐRUR



Bronsustandmynd *Fiskagenta* (2010) eftir italska listamannin Gianfranco Nonni. Standmyndin er reist til minnist um allar tær røsku kvinnurnar, sum arbeiddu í fiski.

At vera fiskagenta var eitt serligt arbeiði. Tað var tungt og strevið. Kuldi, salt og vatn vóru gerandiskostur fyri hendurnar, eins og kvinnurnar ofta stóðu úti og arbeiddu.

Menninir fóru við slupp (vís børnunum á "Westward Ho" og "Norðlýsið") at fiska undir Íslandi. Teir flaktu og saltaðu toskin, og kvinnurnar arbeiddu fiskin á landi. Tær vaskaðu hann, so hann skuldi gerast serliga hvítur og fáa góðan prís. Eisini skuldu tær breiða hann út á fiskastykki, so hann tornaði og hvítnaði[2].

Saltfiskaarbeiðið var stríggið arbeiði, tí ofta máttu tær skunda sær, áðrenn eitt æl kom og spilti tað heila. Fiskurin bleiv pakkaður í hessjansekkir, og so var hann klárur at selja. Sluppirnar tóku hann umborð aftur og førdu hann suðureftir at selja. Í Suðurevropa, í Spania, Portugal og Italia, dámar teimum væl at eta saltfisk í føstu.

!

## UPPGÁVA

**Hygg at standmyndini.** Gakk rundan um hana. Nert við hana. Royn og ger sama arbeiði sum fiskagentan: drep hendurnar í vatn og skrubba flakta fiskin, sum hon heldur á. Hvussu kennist tað? Hvat fert tú at hugsa um? Hvussu sær fiskagentan út? Er hon stór/lítil, kedd/glað/álvarsom/blíð? Hvørjum klæðum er hon í? Hvørji amboð hevur hon? Heldur tú, at hon skuldi verið í arbeiðshandskum? Hví/hví ikki?

Munnu fiskagentur vera til enn? Vita tit, hvat ein flakakvinna er? Sig eitt sindur um, hvørji skip hava avloyst sluppirnar, og hvat og hvar verður fiskað nú á døgum.

!

## UPPGÁVA

Tá ið tit koma heim aftur á stovnin, kunnu tit lurta eftir sanginum "Katrin býr á strondini" (1925) eftir H. A. Djurhuus Katrin - YouTube og tosa um søguna og "óvanlig" orð í sanginum. T.d. hvørji fólkini í sanginum eru, hvat tey gera, og hvussu tey síggja út. Hvat merkir: dúkað segl, fiskigarpar, bønarorð, íslandstosk, jøkulsrond og "Katrin eigur ikki jørð og neyvan borð og disk".

!

[2] *Eitt fiskastykki er yviri við Strond millum húsið hjá radioamatørunum og kampingplássið*

**Prátið um Müllers Pakkhús og Skeiva Pakkhús, og hví Skeiva Pakkhús man eita so? Hvat hoyra tit kring tykkum? Hoyra tit nakað arbeiðsljóð? Hvussu ljóðar tað?**

**Gamla hospital** ella **Færø Amtshospital** (1829-1924) stóð upprunaliga har, sum skipini verða drigin upp á bedingsvogninum. Greiðið børnunum frá, at einaferð var hatta tað, sum svarar til Landssjúkrahúsið og tvey sjúkrahús aftrat (á Tvøroyri og í Klaksvík), og at fyri knapt 200 árum síðan var bara EIN lækni í øllum Føroyum. Í 1924 kom Dronning Alexandrines Hospital. Tað er tann parturin av Landssjúkrahúsinum, har at kalla øll børn í Føroyum verða fødd. Tað er teirra fyrsta stað í lívinum uttan fyri búkin á mammu síni.





Gakk fram við Skipasmiðjuni, hygg, lurta og snodda. Hvat skip er á beding, hvat verður gjørt við skipið ella skipini? Hvat man vera í øllum teimum stóru bygningunum?




Kenna børnini onkran, sum siglir, koyrir trukk, krana ella hevur arbeiði á skipi, báti, kai, pakkhúsi, fiskavirki ella skipasmiðju?

# MÓÐURMÁLIÐ



Standmynd høgd úr føroyskum basalti til minnis um V.U. Hammershaimb, sum verður sagdur at vera faðirin at føroyska skriftmálinum. Janus Kamban (1913-2009) var fyrsti føroyingur at fáa listútbúgving sum myndahøggari. Hann hevur gjørt mong listaverk kring landið, og eru tey eyðkend, tá ið eygað hevur sætt nøkur teirra. Hann hevur t.d. eisini gjørt myndina Søgumaðurin, sum hongur á Finsen ella gamla Kommunuskúlanum út móti Niels Finsens gøtu.

*Á Móðurmálinum* stendur
***1846 legði V.U. hammershaimb lunnar undir móðurmál okkara***
og hinumegin stendur
***Mildar veittrar tendraðu ein vita Føroyum stjørnuleið frá øld til øld***
(orðini eru úr yrking eftir J.H.O. Djurhuus, sum hann yrkti til 90 ára føðingardagin hjá Hammershaimb).

Fáið børnini at gruna um, hví standmyndin man vera staðsett júst her, nærhendis Føroyamálsdeildini og Landsbókasavninum. Tit kunnu ganga niðan móti Vesturkirkjuni annaðhvørt eftir gøtuni niðan móti Gróthúsinum/Náttúrugripasavninum og vísa á, at V.U. Hammershaimb eisini hevur fingið eina gøtu uppkallaða eftir sær. Ella tit ganga eftir V.U. Hammershaimbs gøtu fram við Ellisheiminum og niðan millum gøtuna fram við Rættará.

**Hugleiðing:** tosið um mál. Hvat merkir talumál og skriftmál? Komið inn á, at í Føroyum hava vit *eitt* skriftmál, men *fleiri* talumál (dialektir og sosiolektir, t.v.s. bygdamálføri, men eisini ungdómsmál og mál knýtt at ávísum samfelagsbólkum).

Tosið eisini um móðurmál, hvønn týdning tað hevur, og at summi hava tvey móðurmál. Vit hava eisini teknmál. Hvør brúkar tað? Hví er tað snilt? Hvat mál er "tekn-til-talu"? Hvat er kropsmál?

Hvørja aðra merking hevur orðið "mál"? Mann kann skora mál. Eisini ber til at seta sær mál. Kann mann mála við málinum? Um ja, hvussu ger ein so?

## UPPGÁVA

**Hygg at standmyndini.** Gakk rundan um hana. Nert við hana? Nú hevur tú nortið við málið. Er tað vanligt at nerta við málið? Hvat sært tú? Hvørji munnu fólkini vera? Børn, gentur og dreingir, vaksin, gomul, ommur og abbar. Hvat sært tú? Hvat man fara fram á báðum myndevnunum, sum tú sært? Gera fólkini tað sama?





Fá tey vaksnu at lesa og týða tað, sum stendur skrivað? Hvat heldur tú um, at ein standmynd eitur *Móðurmálið*. Kann mál vera úr gróti? Hví/hví ikki?

Um standmyndin fekk rødd og slapp at siga, hvat hon hoyrdi og sá um dagarnar. Hvat heldur tú, hon hevði fortalt?

Hvar fær ein málið frá? Kann man geva hvørjum øðrum mál? Hvussu tá? Hvønn týdning man tað hava? Hvat um onkur einki mál hevur? Hvussu man tað vera?

**Niðaneftir fram við Rættará:** fylg ánni. Hvussu ljóðar hon? Hvat síggja tit? Hvat livir og veksur har? Duga tit at lesa árstíðina burtur úr ánni? Hon hvørvur, "fer undir heilt" sigur mann, tá ið hon er undir vegnum og ikki sæst. Og so sæst hon aftur í túninum uttan fyri Vesturkirkjuna, har ein lítil tjørn er, og so verður hon aftur til á við Mattalág. Vísið børnunum á gomlu mylluna í Mattalág.

# SIGMUNDUR BRESTISSON



Standmynd úr bronsu við heitinum *Sigmundur Brestisson* (2006) eftir Hans Paula Olsen.

Hon varð reist til minnis um, at í 1999 vóru túsund ár, síðan Føroyar vóru kristnaðar. Í Sandvík er eisini standmynd reist til minnis um Sigmund Brestisson, sum Hans Pauli Olsen hevur gjørt.

**Søga og hugleiðing:** sigið børnunum søgnina um Sigmund Brestisson – hvussu hann kristnaði Føroyar við at hótta Trónd í Gøtu við svørði, at hann varð fostraður upp hjá Tróndi í Gøtu, tí har fekk hann bestu uppaling og útbúgving, sum hóskaði seg til høvdingason. Greiðið eisini frá summum av brøgdum hansara, at hann kláraði at leypa um Sigmundsgjógv og svimja um Suðuroyarfjørð.

Tit kunnu greiða frá, at tað gevur meining, at sandvíkingar vilja hava standmynd av einum svimjandi Sigmundi Brestissyni.



## UPPGÁVA

**Hyggið at standmyndini bæði nær og burturfrá.** Hvat síggja tit? Nevnið so nógvar lutir, tit kunnu. Hvussu sær Sigmundur út? Hvussu nógvar krossar síggja tit, tá ið tit standa framman fyri Sigmund (tann í vesturendanum á Vesturkirkjuni kann telja við). Hvussu er Sigmundur ílatin? Hvussu sær báturin út? Hví man ein bátur eisini vera partur av standmyndini? Hvat slag av gróti stendur Sigmundur á? Er tað sama tilfar, sum "Móðurmálið" er gjørt úr? Spyrjið børnini, hvat tey halda um at hava eina standmynd av Sigmundi Brestissyni framman fyri Vesturkirkjuna.

Prátið um tjørnina og tað lív, sum er í henni og ánni. Hvat síggja og hoyra tit? Prátið eisini um Vesturkirkjuna. Hvussu hon sær út, at hon skal ímynda eitt seglskip við sínum høga torni og stóru takflatu. Minnið tey á, at "Westward Ho" og "Norðlýsið" vóru sluppir við mastrum og seglum, og at sovorðin skip hava verið fyrimynd, tá ið Vesturkirkjan bleiv bygd. Tornið er 42 m. Ein handbóltsvøllur er 40 m. Tit kunnu leggja tykkum niður og máta, hvussu long tit eru tilsamans.

Er tornið á Vesturkirkjuni hægri enn tit til longdar, ella hava tit munin?



## UPPGÁVA

- Tá ið tit koma aftur á stovnin, kunnu tit lurta eftir søgnini um Sigmund[3].
- Tit kunnu hyggja á eitt føroyakort og práta um Føroyar. Hvar tit búgva, hvar flest fólk í Føroyum búgva, og hvar Sigmundur og Tróndur búðu. Eisini kunnu tit práta um, hvussu langt Sigmundur svam, hvar Sandvík er, og hvønn veg Smyril siglir.
- Í Brestiskvæði (1929) eftir Mikkjal á Ryggi stendur í ør. 8 og 9, eftir at Sigmundur og Tórur hava júkað um at sleppa við út í Lítlu Dímun eftir bjargaseyði, og tey vaksnu (páparnir) hava sagt nei: "Svaraði Sigmundur Brestisson, snimma vaks hans hugur: "Hann, ið alist við øsku inni, lítið í leikum dugir!" - "Satt hann sigur, sonur mín," Brestir tók til orða, "eingin skal hjá ungum alva bragdarhugin forða." Hvat merkir tað? Hóskar hatta at siga bara "fyrr í tíðini", ella kunnu vit læra nakað nú á døgum?

[3] *Tað besta er, at onkur vaksin átekur sær uppgávuna at siga søgnina um Sigmund. Ikki lesa upp, men siga frá uttan bók. Søgan um Sigmund kann síggjast sum sett saman av fleiri søgnum. Sig eina ella tvær, og so kann onkur annar vaksin taka yvir, ella bíða børnini til ein annan dag og hoyra meir. Søgan um Sigmund er eisini til sum hoyrispæl á heimasíðuni hjá KvF við heitinum "Søgan um Sigmund" og varð send í fleiri pørtum í Barnaútvarpinum.*

**So gongur leiðin eftir Frælsinum oman á Landssjúkrahúsið** (LS). Tosið um teir stóru bygningarnar, sum tit ganga framvið: Skúlan á Trøðni, Námsvísindadeildina, Sjómansskúlan, Nóatún, Føroya fólkaháskúla og bygningarnar høgrumegin, sum eru partur av LS.

**Áðrenn tit fara inn í forhøllina,** kunnu tit ganga eitt sindur runt uttanfyri og vísa á elsta partin av LS, sum er føðideild og varð rópt Dronning Alexandrines Hospital.

Minnið børnini á, hvussu Gamla hospital við Skipasmiðjuna sá út, og hvussu okkara nútíðar sjúkrahús sær út. Síðan kunnu tit greiða frá ymsum byggistigum og vísa á bygningarnar oman fyri vegin og nýggja H-bygningin.

Tyrlupallurin hevur helst áhuga hjá børnunum, og tit kunnu greiða frá, hvussu tyrlan veitir skjóta hjálp, og at sjúkrahúsini eru knýtt saman m.a. við tyrlusambandi.

## NÝFØÐINGUR OG NORNUR



Standmynd úr bronsu við heitinum *Nýføðingur* (2004) eftir Hans Paula Olsen.

**Søga og hugleiðing:** Tosið við børnini um orðini "nýføðingur" og "nýføroyingur" og knýtið uppí tað at duga og læra seg mál – ymisk mál og kanska tvey móðurmál.

**!**

### UPPGÁVA

**Hygg at standmyndini.** Nert við hana. Hvussu følist hon? Er munur á at nerta við grótið og bronsutilfarið? Hvussu tá? Hvat heldur tú um, at eitt pinkubarn er tað fyrsta, sum ein sær, tá ið ein kemur á sjúkrahúsið? Hvat ger ein á sjúkrahúsinum (tosið bæði um tey, sum arbeiða har, og hava hjálp og røkt fyri neyðini)



Málningurin Nornur (2012) eftir Edward Fuglø.

**Søga og hugleiðing:** Sig børnunum frá teimum trimum nornunum úr norrønu gudalæruni, og hvønn leiklut tær høvdu. Vita, um børnini síggja okkurt av søguni í málninginum.

Málningurin hevur eina rúgvu av symbolum; “lesið” symbolini við teimum. Gáið eftir, hvat hugtekur børnini, og um tey niðan fyri skúlaaldur lesa málningin, eins og vit “spiltu”: úr erva frá vinstru til høgru og niðureftir. Tað kann vera, at teirra óspilti myndalestur letur upp fyri onkrum øðrum.

## UPPGÁVA

**Hygg at málninginum.** Hvat sært tú? Fólk, dýr, lutir, tankar, dreymar v.m.? Hvørjar litir sært tú? Hvat hendir á málninginum? Hvat heldur tú, hann vil siga tær? Hvat fert tú at hugsa, tá ið tú sært málningin? Veitst tú, hvat nornur eru? Bið tey vaksnu siga frá.

Heldur tú hatta vera eina góða sjúkrahúsmynd? Hví/hví ikki?

## UPPGÁVA

- Tá ið tit eru komin heim aftur á stovnin, kunnu tit mála/tekna eitt listaverk við íblástri frá tí, tit sóu á Landssjúkrahúsinum. Hugsið um, hvat tit sóu og fóru at hugsa og málið/teknið tað.
- Tit kunnu gera tykkara egnu lítlu standmynd úr pappírsdeiggi (pappmaché) og hava listasýning fyri foreldrum og vaksnum.
- Tit kunnu mála, hvussu tað er at hava mál – ein rødd, sum tosar, og eitt høvd við heila, sum dugir orð, eisini kunnu tit mála, hvussu tað er at hava mál uttan rødd, og hvussu tað riggar.
- Tit kunnu hava runding og práta um mál og at skilja hvønn annan. Eisini, at mann kann royna at skilja hvønn annan og hjálpa uttan altíð at hava tey røttu og mongu orðini.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA